# Vit mugu seta okkum langtíðarmál við Suðuroy

**– Vit mugu seta okkum langtíðarmál fyri, hvussu Suðuroyggin skal mennast í framtíðini, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum**

ØKISMENNING
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er avgerðandi, at virkini í Suðuroy verða loyst frá Fiskavirking og at grundarlagi á privatum øki kemur ístaðin, heldur landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu*

– Eg ivist ikki í, at tað eru bæði dugnaligir íverksetarar og dugnaligar leiðarar í Suðuroy. Men eg stúri fyri, at samanhaldið er ov lítið.

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum er ein týðandi politikari í royndunum hjá samgonguni at finna semju um politisk tiltøk at fáa Suðuroy á føtur aftur.

Men hann stúrir fyri, at manglandi evni hjá suðuroyingum at at standa saman og draga somu líni, er ein stórur snávingarsteinur í royndunum at fáa menningina í oynni aftur á beint.

Jógvan við Keldu samanber støðuna í Suðuroy við støðuna í Klaksvík og sigur, at tað sum bjargaði Klaksvík, var, at Fiskavirking aldrin slapp framat nøkrum virki í Klaksvík.

Hann ivast ikki í, at Fiskavirking fatur á virkjunum í Klaksvík, vóru fleiri av teimum stongd og tað høvdu teir ikki kunna livað við

– Suðuroyggin er langt burtur frá meginøkinum og eg haldi, at tað er umráðandi at fáa virkini í oynni, sum Fiskavirking hevur, yvir á privatar hendur.

Hann heldur, at tað er neyðugt at tær lokalu kreftirnar sleppa framat og fáa lagað viðuskiftini útfrá teirra egnu fortreytum og ikki útfrá fortreytum, sum hóva eini virkisleiðslu norðuri á meginlandinum.

Og hann heldur somuleiðis, at við teimum atfinningum, sum bæði politiska skipanin hava ímóti framferðini hjá Fiskavirking, ber tað ikki til, at Fiskavirking letur eitt heilt økið liggja deytt.

Hinvegin heldur Jógvan við Keldu eisini, at politikarar eru mangan ov ótolnir.

– Tað er ikki altíð, at tað verður hugsað nóg langt fram í tíðina.

Sjálvur minnist hann, at tá ið sum borgarstjóri í Klaksvík síðst í áttatiárunum, metti, at vit fingu undirsjóvartunnil um Leirvíksfjørð og at klaksvíkingar fingu ein nýmótans miðbý um eini 15 ár.

– Hetta var ikki altíð líka væl móttikið. Atfinningarnar vóru harðar og í besta føri ristu fólki við høvdinum og hildu meg ikki vera rættsiktaðan.

Hann sigur, at hetta er eitt dømi um at tað viðhvørt er neyðugt at hugsa framum »her og nú loysnir« og arbeiða fram ímóti einum máli, sum liggur longri frammi í tíðini enn politikarar vanliga hugsa um.

### Loysnin má koma úr Suðuroy

Hinvegin heldur Jógvan við Keldu eisini, at tað er av størsta týdningi, at landsstýrið ikki átekur sær leiklutin sum lokomotivið, ið skal draga Suðuroynna fram á leið.

– Tað eru fyrst og fremst suðuroyingar sjálvir, ið mugu loysa trupulleikan og skera út í kortið, hvussu oyggin skal síggja út framyvir. Eru tað so viðurskifti, ið eiga at broytast og sum landsstýrið hevur ávirkan á, má landsstýrið taka tað upp og broyta tey neyðugu viðurskifti, tí útjaðaraøkini mugu hava loyvi at mennast til gagns fyri alt samfelagið.

– Tað er ikki landsstýrið sum skal ganga á odda. Tað nyttar ikki, at landsstýrið gongur á odda við tiltøkum, sum ikki eru kjølfest í lokaløkinum, sigur landsstýrismaðurin í innlendismálum.

– Tað má heldur ikki vera so, at suðuroyingar føla seg tiknar av ræðið av landsstýrinum, tí talan má ikki vera um, at fólk missa sjálvvirðingina.

Hinegin heldur hann, at landsstýrið kann arbeiða síðuleypandi við ymsum tiltøkum, eitt nú við at beina ójavnan í flutningskostnaði burtur.

– Men eg havi eina kenslu av, at landsstýrið situr mitt í eini viðgerð, sum av røttum átti at farið fram í Suðuroynni. Tað er nógv meiri áhugavert, hvussu suðuroyingar kundu hugsað sær, at trupulleikin verður loystur.

– Hinvegin hevur landsstýrið sera stóran áhuga í, at Suðuroyggin verður ment, so hetta er avgjørt rætta tíðin hjá suðuroyingum at gera vart við seg og gera greitt, hvussu teir halda, at oyggin skal skipast.

– Vit skulu minnast til at, tá ið Føroyar eru bundnar saman í eitt stórt meginøki, og bara Suðuroyggin liggur fyri seg, stendur hon meiri einsamøll enn nú. Tí er neyðugt, at vit longu nú taka atlit til hesi viðurskifti, soleiðs, at Suðuroyggin er ein samanhangandi, samstarvandi og sterk eind. Tá verða tveir tímar til restina av Føroyum og bara 10 tímar til Skotlands.

Jógvan við Keldu heldur, at tað verður rætt borið at, eru stórir møguleikar fyri framman.

– Vit skulu eisini minnast til at 10% av føroyingum búgva í Suðuroy og tí er umráðandi at Suðuroyggin ikki gerst ein útoyggj, í framtíðar Føroyum.

### Neyðugt at skapa arbeiðispláss

Hann heldur, at tað er neyðugt at Suðuroyggin fær arbeiðspláss í oynna, tí hon kemur í øllum førum í nakað nógv ár afturat at verða avskorin frá meginøkinum.

– Arbeiðsloysið er tað hvassasta svørðið av øllum og er fólkið ikki í arbeiði í mánaðir, fyri ikki at tala um í fleiri ár, missir tað uppdriftina og tað er tað mest hættisliga av øllum.

– Framtaksgrunnurin varð settur á stovn við tí endamáli at seta vinnulig tiltøk í verk, sum síðani skuldi seljast.

– Men tá ið Framtaksgrunnurin ikki ber seg at sum væntað, eigur tað at bera til at skifta eina nevnd út. Men tað er kortini ikki bara svart og hvítt, tí nevndin hevur eisini ábyrgdina av pengunum í grunninum.

– Samstundis verður neyðugt at fáa avtalu við skipini, so at virkini í Suðuroy fáa trygd fyri eini ávísari nøgd av rávøru.

Men Landsstýrismaðurin í innlendismálum leggur aftur eisini hetta má síggjast sum ein heild, tí spurningurin er so eisini, um hetta fer at máa støðið undan øðrum pørtum í landinum.

– Tí er tað neyðugt at síggja alt í eini heild, sigur Jógvan við Keldu.

### Fer at taka tíð

Samstundis heldur hann, at tað er neyðugt at broyta kommunuviðurskiftini í oynni verða broytt, so at øll Suðuroyggin dregur somu línu.

– Tað er ikki lætt at loysa trupulleikarnar í Suðuroy. Tað fer at taka tíð at fáa Suðuroy á føtur aftur. Tað skal nýhugsan til og tað skal hart og miðvíst arbeiði til.

– Men tað er eisini ógvuliga umráðandi, at tey tiltøk,sum verða sett í verk, røkka tvørturum næsta løgtingsval.Sostatt mugu tiltøkini hava greiða undirtøku í Løgtinginum, so at vit ikki koma í ta støðu, at næsta samgona setir tað úr gildi aftur, sum hendan samgongan setir í verk. Tað fer at máa álitið undan skipani og fer at gera støðuna hjá suðuroyingum enn verri, eitt nú vissi almenn uttanlandssigling verður sett í verk og verður niðurløgd aftur um nøkur fá ár.

# Nýggi Smyril ikki í sigling ímillum Suðuroy og Skotland

**Tað er ikki ein spurningur, sum er til viðgerðar, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum**

ALMENN UTTANLANDSSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tíðin er ikki búgvin til at taka málið um uttanlandssigling við nýggja Smyrli upp til viðgerðar, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum*

Fyribils verður tað av ongum, at nýggi Smyril verður settur í beinleiðis sigling ímillum Suðuroynna og Havnina.

Tað skilst á Jógvani við Keldu, landstýrismanni í innlendismálum.

Nú samgongan hevur tikið trupulleikarnar hjá Suðuroynni til viðgerðar, hevur tað verið frammi, at ein stórur trupulleiki hjá suðuroyingum er, at tað er onki beinleiðis samband ímillum Suðuroynna og Skotland.

Í tí sambandi hevur eitt uppskot verið, at Smyril skal sigla ímillum Suðuroynna og Skotland einaferð um vikuna.

Í tí sambandi skal Smyril fara av Drelnesi fríggjakvøld og vera aftur á Tvøroyri seinnapart sunnudag.

Ímeðan hann er burtur, skal Smyril, sum nú er, røkt suðuroyarsiglingina.

Men hetta er ikki ein loysn, sum landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur hug til – í hvussu so er ikki, sum landið liggur í løtuni.

### Nakað væl frammi í tíðini

Hann sigur, at hetta er ein loysn, sum tað er nomið við í viðgerðini av trupulleikunum í Suðuroy.

Men hann heldur, at enn er tíðin ikki búgvin at taka hesi viðurskiftini við í viðgerðina.

– Hetta er ein spurningur, sum í minsta lagi liggur nakað væl frammi í tíðina, sigur hann.

Hann sigur at tað einasta, sum er hent á flutningsøkinum, er, at umboð fyri privatu flutningsfeløgini, Strandferðsluna og landsstýrið hava tosað saman.

Á hesum fundinum hendi ikki annað enn at partarnir løgdu síni sjónarmið fram fyri hvørjum øðrum og at teir avtalaðu, at teir skuldu møtast aftur.

Jógvan við Keldu heldur at flutningsmøguleikarnar til og úr Suðuroynni eru eitt úrslit av tí tørvi, sum er á flutningi.

Tí heldur hann, at skulu suðuroyingar gera sær vón um meiri flutning, mugu teir fyrst kunna vísa á, at tað er ein tørvur á tí.

– Og orsøkin til, at tað als ikki ber til at tosa um uttanlandssigling enn, er, at ongin veit hvat kemur á henda á landi í Suðuroy og ongin veit, hvørji virki verða har í framtíðini.

– Tað ber í øllum førum ikki til at tosa um at seta nýggja Smyril í uttanlandssigling fyrrenn eitt útspæl er komið úr Suðuroy, har ein tørvur á flutningi verður ávístur.

– Men tað verður ikki lætt at loysa trupulleikarnar í Suðuroy. Tað fer at taka tíð at fáa Suðuroy á føtur aftur og trupulleikarnir skulu loysast í rættari raðfylgju. Og tað er ikki rætt at byrja við at fara undir beinleiðis sigling ímillum Suðuroy og Skotland, uttan at hava eitt vørugrundarlag at byggja á, ella at grundarlagið sæst í framtíðini.

Men Jógvan við Keldu leggur eisini afturat, at hava suðuroyingar, ella onkur annar, hug til at leiga Smyril, sum nú er, til endamálið, er hann sinnaður at tosa um tað við vælvild.